# Hetlendingar áhuga í tax free skipanini hjá Flogfelag Føroya



*Tá ið útlendsk ferðafólk keypa tax free vørur í Føroyum, fáa tey peningin aftur, tá ið tey fara av landinum.*
*Í byrjanini høvdu vit eina útlendska skipan á økinum; nú er hon føroysk og hugtekur eitt nú hetlendingar*

**Stjórin í hetlendska ferðaráðnum hevur verið í Føroyum og sæð, hvussu føroyska tax free skipanin virkar, og hugsandi er, at hendan verður sett í verk í Hetlandi, sigur Uni Danielsen**

## FERÐAFÓLK & HANDIL

Nú summarið er í hondum, og handlarnir aftur fara at selja tax free ella mvg-fríar vørur til útlendsk ferðafólk, er vert at hava í huga, at skipanin, sum ger, at ferðafólkini kunnu fáa meginpartin av mvg'num aftur, tá ið tey fara av landinum, nú er føroysk og ikki útlendsk.

Tað eru serliga føroyskar ullavørur, sum keyptar verða á henda hátt, og har útlendsku ferðafólkini fáa tað, sum svarar til meginpartin av mvg'num, aftur á flogvøllinum ella umborð á Norrønu.

## Stimbrar føroyska framleiðslu

– Vit høvdu eina útlendska skipan á økinum, sum ivaleyst virkaði rímiliga væl, men skipanina, vit hava í dag, hevur Flogfelag Føroya gjørt og umsitur.

Uni sigur, at tá ið ferðafólk keypa vørur í tax free-handlunum, fáa tey ein kekk, sum tey fara til tollararnar við á veg útaftur av landinum. Her verður kekkurin stempladur, og síðan fara tey til kunningarstovuna ella Flogfelag Føroya á flogvøllinum og fáa meginpartin av tí, sum svarar til mvg'ið, aftur. Sama er, tá ið tey fara av aftur landinum við Norrønu.

Uni sigur, at útlendsku ferðafólkini fáa eitt lítið sindur meira útgoldið eftir nýggju skipanini.

– Flogfelag Føroya umsat eisini gomlu skipanina, men vit hildu tað vera rætt, at vit høvdu okkara egnu.

Skipanin við mvg fríu vørunum ger tað bíligari hjá útlendingum at keypa føroyskar vørur, og hetta stimbrar tískil eisini føroyska framleiðslu og framleiðsluhugin.

## Hetlendingar hava áhuga

Sum nevnt, er tað Flogfelag Føroya, sum eigur hugskotið við føroysku tax free skipanini, og tað er Com Data, sum hevur gjørt telduskipanina í hesum sambandi. Nú vísir tað seg, at eisini aðrir hava fingið eyguni upp fyri føroysku loysnini á økinum.

Uni sigur, at stjórin í hetlendska ferðaráðnum hevur verið í Føroyum og sæð, hvussu føroyska skipanin virkar. Hann er hugtikin av henni og hevur víst á, at hetlendingar kundu hugsað sær at sett føroysku skipanina í verk í Hetlandi, har teir annars hava eina útlendska skipan á økinum, sum teir ikki eru so fegnir um.

– Vit hava fingið ein ítøkiligan fyrispurning um at hjálpa teimum við at seta okkara skipan í verk í Hetlandi, sigur Uni Danielsen og leggur aftrat, at tað er ikki sørt, at Flogfelag Føroya sær eina ávísa æru í hesum.

Verður føroyska skipanin sett í verk í Hetlandi, sum mangt bendir á, er hetta samstundis ein útflutningur av føroyskari vitan og tøkni.


Í Býin

Hafnia Lounge
· Stórt úrval av kaffi
· Dagsins køka
· Sandwich
· Flógv terta við salati
· Ymisk "snacks"
· Smyrjibreyð frá kl. 14-17
(aftaná kl. 17 eftir áheitan)
Upplatingartíðir
*Sunnudag - hósdag*
Opið kl. 14.00-24.00
*Fríggjadag & leygardag*
Opið kl. 14.00-01.00
*Tlf. 31 32 33 · Fax 31 52 50*

fk Matseðilin
Hósdagin 30. mai:
**Minutbúffar**
Fríggjadagin 31. mai:
**Kálvafrikasse**
Leygardagin 1. juni:
**Culottesteik**
Mánadagin 3. juni:
**Kjøtbollar í karrysós**
Týsdagin 4. juni:
**Fisk í fat**
Mikudagin 5. juni:
**Saltkjøt**
***
**Seinnaparts-TILBOÐ**
frá kl. 14.00:
**Juniorburgari 23,00**
**Maxiburgari** *ella*
**Búffsandwich 28,00**
Matstovan í Hoyvík

Felagið Tórshøll
Í vikuskiftinum spæla
Flúrar
Hvørt fríggjakvøld, leygarkvøld og sunnukvøld er
livandi tónleikur
Felagið Tórshøll
Sverrisgøta 22
Tlf. 31 15 65

NÁTT-BUSSURIN
hjá Øssuri Christiansen
Leygarkvøldið :
• Vetsm.-Tórsh. kl. 23.30
• Tórsh.-Vetsm. kl. 00.30
• Vetsm.-Tórsh. kl. 03.30
• Tórsh.-Vestm. kl. 04.30
(Koyrt verður um Kvívík og Kollafjørð eftir avtalu)
Onnur kvøld kann koyrast eftir avtalu
Tlf. 424254
Bussarnir:
Tlf. 286254

Klubbadansur
*Leygarkvøldið 1. juni spæla*
*Bacon & Ragnar í Vík*
*Havnar Klubbi: staðið , har fólk møtir áðrenn tað er tíð at fara heim*
HAVNAR KLUBBI
Stovnaður 1799
Sosialurin - 311820

KOM OG DANSA Í PLATFORM
MÁNAKVØLDIÐ TANN 3. JUNI
Katrin Dahl Christiansen og Mia Cameron leggja lag á við m.a. hip hop og Line dans
Tiltakið verður fyri bæði gentur og dreingir frá 13 - 17 ár
kl
Royk- og rúsfrítt sjálvandi
Sodavatn og Sunkist verður eisini at fáa til keyps
KOSTNAÐURIN:
Við Pluss Korti frá Føroya Sparikassa verður kostnaðurin kr. 25,-
40,-
Foreldrabólkurin: Sólrún 210780 · Tone 251165 · Lise 260334





Í Býin

Casablanca
Ristorante
Frá kl: 17:00
Bar-B-Cue
OKSAKJØT
LAMBSKJØT
KALKUN
KYLLINGUR
PYLSIR
EXOTISKAR
SÓSIR
YMISKAR
DRESSINGAR
GRØNMETI
SALATIR
BAKAÐI EPLI
POMMES
FRITTES
RÍS
Veljið sjálvi, og lat Okkara kokk steikja tað.
ET TAÐ TÆR LYSTIR
BERT 98,-
Bileggið borð á tlf 319696

Klaksvíkar Klubbi
Tlf. 455681
**Fríggjadagin 31. mai**
• Opið hús frá k. 17.00-04.00
UNDIRHALD
**Leygardagin 1. juni**
• Opið hús frá kl. 18.00-23.30 og frá kl. 01.00-04.00
**Sunnudagin 2. juni**
• Opið hús frá k. 14.00-04.00
**Øll kvøldini spæla "SIGGI & KEITH" til dansin**

Kaggin
Hóskvøldið spæla
Déjà-vu
Double up frá 22-23 ókeypis atgongd
Í vikuskiftinum spæla
Ólavur Øster Band
Fríggjakvøldið ókeypis atgongd áðrenn kl. 1.00
KAGGIN
www.kaggin.fo
Sosialurin - 311820





HESA VIKUNA
Hóskvøldið
Happy Hour frá kl. 21.00 til 22.00
DJ Beat-Houven
Ókeypis atgongd til kl. 22.00
Fríggjakvøldið
ladies night & Happy Hour til kl. 1.00
DJ Beat-Houven
Vitjan av gandakalli og show dansarindu
Leygarkvøldið
DJ Beat-Houven
Fótbóltur á stórskíggja
Café'in hevur opið mán.-frí. 17.00-24.00 og leyg.-sun. 14.00-24.00
Club 20 Café
Írskur búffur
v/chips, salat & whiskeysós
EISINI TANN BESTI Í LANDINUM
69,-
Discoteque Club 20
Tinghúsvegur • Tórshavn • Tlf. 31 56 28
www.club20.fo





fríggjakvøldið 31/05
1. ára føðingardagur
DJ Ottar í Funningsstovu
Ókeypis "BIIP" * alt kvøldið
* sí www.platform.fo
leygarkvøldið 01/06
DJ Ottar í Funningsstovu
PLATFORM
discoteque
sí www.platform.fo
petur & petur • 320870

AUTO
-Dag & nátt-
-Alt døgnið-
Hýra bil
- ring 311234
BENZIN
DIESEL
KIOSK
AUTO
311234

Manhattan
PUB & CAFÉ
Óskar Einarson





LIVE
Hóskvøldið
Fríggjakvøldið
Leygarkvøldið
Sunnukvøldið